# Til Erling Marius Kjærbo á 80-ára degnum tann 22. november

Góði Abbun

Hetta er bara ein lítil heilsan til tín á 80-ára degnum, eg eri kedd av, at okur ikki kunna komað heim í føðingardag hjá tær.

Tá eg var lítil, segði eg einaferð ”Stakkals tey sum onga Ommu og Abba eiga”, longu tá visti eg at Omma og Abbi mín vóru nakað heilt serligt. Men tad er ikki fyrr enn nú, eg er flutt til Danmarkar og havi fingið Enu og Marius, at eg eri blivin klár yvir, hvussu vigtig tikur hava verið fyri meg, og tú enn er fyri okkum, nú okur ikki hava Enu-ommuna meira.



Eg skilji ikki, at tú longu fyllur 80-ár, tú hevur lyndi sum ein unglingi, kenni ongan við einum humøri sum tú, tú er altíð í góðun lag, tú gongur enn niðan á Klummara hvønn dag, tú setur eplir niður, passar seyðin, hoyggjar, gongur burtur í haga, og tað er ikki meira enn nakrir mánaðir síðani tú var í Rødovre í brúdleypi og okur dansaði til tann ljósa morgun.

Keðiligt at okur bara síggjast í summar og í jólaferium, kundi gott hugsa mær at Ena og Marius, vóru meira saman við tær, so tú kundi fortalt teimum søgur, nana náði og sungið fyri teimum, tikið tey við út í náttùruna, og lært tey alt tað tú lærdi meg og Sólfinn og Monrad sum børn.

Míni allarbestu barnaminnir eru tá okur hoyggjaði á Klummarinum, te-munnar og pannukøkur í tí lítla húsinum, reiggjur í hoyggjhúsinum, barnabyrður og kilingahopp, túrarnir runt um Klummaran í tí heimagjørda traktorinum, og so røturnar áðrenn okur skuldi oman aftur um kvøldarnar, tú hevði altíð tíð til okkum børn. Eisini tá tað bleiv rikið um summari, fingið okur lov til at koma við til Blæingar, tú fortaldi okkum søgur um hagan, lærdi okkum um seyðin, leitaði eftur likkueggum við okkum og man fekk altíð eina pisu ella tvær við heim.

Og so ikki at gloyma sjavskvøldini i køkuni, saman við Gubbanun og Otto, kenni ongan sum kan spæla sjavs sum tikur.

Góði Abbun. Hjartaliga tillukku við 80 ára degnum og mong góð ár í framtíðini, má Jesus pápi fylgja tær.

Leingjast illa eftur tær í dag, gleða okkum at síggja teg á jólum.

**Kærar heilsur**
**Siri, Tue, Ena og Marius**

---

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Jallgrím Hentze av Sandi** fer úr Landssjúrkshúskapellinum mikukvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum hósdagin klokkan 13.

**Erling Poulsen, fyrrverðandi lærari, ættaður úr Vági**, andaðist í nátt á Suðuroyar Sjúkrahúsi, 82 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum klokkan 14.30 til Smyril. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

---

**Dagurin**

**23. november. Klæmintsmessa.** Vit vita, at hesin Clemens (deyður umleið ár 107) livdi í Róm, tá ápostulin Pætur var á døgum, og gjørdist triði maður í stóli hansara. Eftir øllum at døma hevur hann skrivað tað brævið, ið verður rópt fyrra Klæmintsbræv, sum er frá árinum 96. Um Klæmint sjálvan eru nógvar halgisøgur, og sagt verður frá, at hann endaði dagar sínar við at verða blakaður í havið við einum akkeri um hálsin. Hann hevur síðani tá verið virdur sum ein av verndamonnunum hjá teim sjófarandi.

Latínska navnið Clemens merkir hin mildi.

---

Listaframsýningin „Someplace“:

# Ásla Rannvá og Jóhan Martin í Smiðjuni

Fríggjadagin 24. november kl. 16 lata listafólkini Ásla Rannvá Svensson og Jóhan Martin Christiansen upp ein listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Á framsýningini, sum tey kalla »Someplace«, eru umleið 30 listaverk, mest akrylmálningar og nakrar grafiskar prentmyndir.

Framsýningin er opin í vikuskiftinum: fríggjadagin kl. 16-19, leygardagin kl. 13-17, og sunnudagin kl. 15-19.



*Í vikuskiftinum hava listafólkini Jóhan Martin Christiansen og Ásla Rannvá Svensson listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri sonur, bróðir, svágur og mammubeiggi

**John Haraldsen**

andaðist og varð jarðaður

Tøkk til Sverra Steinhólm fyri troystarrík orð í kapellinum. Tøkk til Ingu P. Dam fyri troystrík orð í heiminum og kirkjuni. Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar. Tøkk til tykkum sum hjálptu til við jarðarferðina. Tøkk til tykkum sum sendu blómur og kransar. Tøkk til tykkum sum sendu peningagávu til Føroya Blindafelag. Eisini ein tøkk til tykkum sum fylgdu John til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarandi*
**Mona, Hallur, Toni og Birgit**